

# OBAMA BASTI OSAMA

POLITISKU **MÓTSTØÐUMENNIR** HILDU HANN VERA OV **VEIKAN** Í **STRÍÐNUM** ÍMÓTI **YVIRGANGI**. SO **BRÁDLIGA** GAV BARACK OBAMA **BOÐ** UM AT **LOYPA** Á EIN VÆL **VARDAN** BYGNING Í ABBOTTABAD Í **PAKISTAN**, HÓAST ONGIN VISTI VIÐ **VISSU**, UM **OSAMA BIN LADEN KRÓGVAÐI** SEG HAR. ÚRTØKAN VAR **BETRI**, ENN HANN HEVÐI **DROYMT** UM. **HEIMSINS** MEST **EFTIRLÝSTI YVIRGANGSMAÐUR** VARÐ **DRIPIN**, OG IKKI EIN **EINASTI** AMERIKANARI FEKK MEIN. **BARACK OBAMA** HEVUR STAÐIÐ **SVEINAROYNDINA** SUM HARÐUR **HÁLSUR**



**YVIRGANGUR**
Uni Arge
ua@sosialurin.fo

Hvar vart tú, tá tú frætti, at Osama bin Laden var skotin, fara tey at spyrja í alla framtíð, tí hendingin mánamorgunin 2. mai í 2011 var veruliga ein av teimum heilt stóru í heimssøguni. Heimsins mest umrøddi og eftirlýsti yvirgangsmaður var loksins fallin fyri kúlunum hjá servandum amerikonskum hermonnum. Í 10 ár høvdu amerikanarar leitað við ljós og lykt eftir heilaga krígsmanninum, ið skipaði fyri yvirgangsatsóknini á World Trade Center og Pentagon tann illa gitna 11. september í 2001. Nú hevði USA fingið sína hevnd.

Amerikanarar hataðu inniliga saudi-arabiska ríkmannasonin, ið heldur vildi gerast yvirgangsmaður enn byggiharri í familjufyritøkuni í Saudiarabia. Osama bin Laden eggjaði alment øllum til at drepa amerikanarar kring allan heim, og hann helt uppá, at um stríðst varð nóg leingi ímóti USA, fór heimsins einasta stórveldi at falla eins og gamla Sovjetsamveldið. Í ovastu politisku leiðsluni í USA, í CIA og í amerikanska herinum høvdu tey tí eittans mál. At beina fyri ónda fíggindanum við teimum merkiliga blíðu eygunum, so hann aldrin kundi klúgva í tvey aftur.

Nú tekur Osama bin Laden so ongantíð orðið aftur. Meðan tey flestu hildu, at hann krógvaði seg í onkrum helli á markinum millum Afganistan og Pakistan, og at alvápnaðir krígsmenn vardu hann har, búði maðurin í einum stórum bygningi mitt í einum friðarligum býi 100 milometrar norðan fyri pakistanska høvuðsstaðin, Islamabad. Minni enn ein kilometur haðani var ein hernaðarskúli. Hvussu kundi heimsins mest eftirlýsti yvirgangsmaður krógva seg so væl á einum so ásýniligum stað? Hetta er ein av stóru andsagnunum, nú miðlarnir ídnir greiða frá, hvussu amerikanarar funnu Osama bin Laden.

### Funnu sendiboð

Barack Obama gav fýra mánaðir eftir, at hann var komin í Hvítu Húsini, boð um, at Osama bin Laden skuldi finnast og takast. Tað, sum Bill Clinton ikki hevði megnað, og sum George Bush heldur ikki megnaði, ætlaði Obama at klára. Amerikanarar vistu, at veika liðið hjá bin Laden vóru hansara sendiboð. Eltu teir sendiboðini, kundu teir finna Osama. Í 2003 og 2005 tóku teir tveir týðandi menn í Al-Qaida, Khalid Sheik Mohammed og Abu Farraj al-Libbi. Teir vórðu avhoyrdir við harðari hond, men tá teir vórðu spurdir um sendiboðið, Abu Ahmed, søgdu teir, at maðurin hevði ongan týdning.

Hetta vakti illgruna hjá amerikanarunum, tí aðrir, ið vóru avhoyrdir, høvdu sagt, at hesin Abu Ahmed hevði stóran týdning í yvirgangsfelagsskapinum og var tætt knýttur at Osama bin Laden. Spurningurin var so, hvør hesin Abu Ahmed var. Tað vísti seg, at hann æt Sheikh Abu Ahmed og var pakistani, men hann var ongastaðni at finna. Í fjør hendi tó nakað, sum at enda skuldi kosta bin Laden lívið. Sheikh Abu Ahmed ringdi til eitt av sínum sambondum, ið USA avlurtaði. Amerikanarar funnu nú Sheikh Abu Ahmed, sum óvitandi førdi teir til bygningin í Abbottabad.

Bygningurin var sera áhugaverdur, helt CIA. Kring bygningin vóru stórir múrar við píkatráði, og internetsamband var onki. Haraftrat brendu íbúgvarnir ruskið heldur enn at blaka tað burtur. Amerikanarar funnu útav, at Abu Ahmed búði har saman við familju síni og beiggja sínum, sum eisini hevði konu og børn har. Haraftrat búði í bygninginum ein kona og fleiri onnur børn. Hennara aldur svaraði neyvt til aldurin á yngstu konu bin Laden og børnum hansara. Var bin Laden veruliga í bygninginum? Var hann als ikki umgyrdur av alvápnaðum heilagum krígsmonnum?

### Vildi hava prógv

Hetta fingu amerikanararnir ongantíð at vita við vissu. Tá Barack Obama gav boð um, at loypast skuldi á bygningin, vóru forsetin og ráðgevar hansara bara 60-80 prosent vísir í, at teir høvdu funnið Osama bin Laden. Obama varð áhaldandi kunnaður um, hvussu CIA nærkaðist bin Laden. Hann fekk fleiri uppskot um, hvussu USA kundi gera av við yvirgangsmannin. Eitt av uppskotunum var at bumba bygningin í spønir. Hetta dámdi honum ikki. Tá fór at gerast trupult at gera av, um bin Laden veruliga var har, og eisini fóru óneyðuga nógv mannalív at verða týnd, kanska 22 tilsamans.

Fríggjadagin 29. apríl gav amerikanski forsetin so boð um, at servandar herdeildir, teir sonevndu Navy Seals, skuldu loypa á bygningin og annaðhvørt taka ella drepa Osama bin Laden. Altumráðandi var, at servandu hermenninir løgdu prógv á borðið um, at teir veruliga høvdu fingið fatur á rætta manninum. Í fleiri vikur frammanundan vandu 80 hermenn